


## Umhvørvisvikan sett

Klokkan tíggju í morgun varð nú árliga umhvørvisvikan hjá Tórshavnar kommunu sett. Tað var forkvinnan í Heilsu- og umhvørvisnevndini, Elin Lindenskov, ið setti vikuna, sum í ár hevur fingið temaið Áin, vágin og fjøran. Nógv tiltøk standa á skránni hesa vikuna, sum hevur til endamáls at gera fólk tilvitað um umhvørvið í gerandisdegnum. Fleiri tiltøk verða eisini fyri børnum, og Elin sigur, at tað hevur stóran týdning at gera børnini tilvitað um umhvørvið. Tað hendir millum annað við einari teknikapping á Býarbókasavninum, at temaið er umhvørvi. Í sambandi við setanina platnaðu býráðslimir og deildarstjórar hjá kommununi trø í skráninginum við Tórsbreyt, har setanin var. Seinni fáa eisini øll húski í kommununi høvi at planta sítt egna træ, sum tey fáa frá kommununi. Tveir ruddingardagar verða, annar mikudagin, tá handlar, stovnar og fyritøkur fara at rudda, meðan tað leygardagin verður frá felagsskapum og privatum, at rudding stendur á skránni. Hetta er 6. árið, at Tórshavnar kommuna sipar fyri umhvørvisviku.

# Prátið yvirdrivið

**MAKRELUR Skiparin á Finni Fríða, Andri Hansen, heldur, at Føroyar heldur eiga at áseta sær eina royndarkvotu eftir makreli enn eina stóra eginkvotu, tí ivasamt er, hvussu nógvur makrelur kann veiðast í føroyskum sjógvi í summarhálvuni**

Vilmund Jacobsen



ROYNDARKVOTA

*Finnur Fríði hevur roynt eftir makreli í føroyskum sjógvi, men veiðan hevur ikki vignast*

Finnur Fríði hevur júst verið í føroyskum sjógvi og leitað eftir makreli, men skiparin, Andri Hansen, letur ikki væl at.

Hann sigur, at hóast teir hava verið hampiliga víða og leitað, hava teir bert fingið smávegis nøgdir av makreli – og ikki nær til so mikið, at veiðan hevur verið lønandi.

- Vit fingu bert uppí nakrar fáa kurvar í onkrum háli, sigur skiparin á Finni Fríða.

### Yvirdrivið

Andri Hansen vísir á, at hóast hetta var ein stutt roynd, heldur hann, at nógva prátið, sum verið hevur um makrel í seinastuni, hevur verið ikki sørt yvirdrivið.

- Vit, sum eru í vinnuni og reka skipini, áttu at vitað líka væl sum tey, sum ikki eru í vinnuni. Tey nógvu úttalilsini um allan hendan makrelin í føroyskum sjógvi er ikki tað, sum vit uppliva á havinum.

Skiparin á Finni Fríða sigur, at teir á hesum túri sóu nógva skrift á onkrum øki, men hetta vísti seg at vera laksild.

- Eitt er, at tú sært nógva skrift. Annað er, um fiskurin stendur so mikið tættur, at hetta gevur lønandi veiði, sigur hann.

**.. vit, sum og reka skipini, áttu at vitað líka væl sum tey, sum ikki eru í vinnuni....**

ANDRI HANSEN, SKIPARI

### Royndarkvota

Tað er eingin loyna, at Felagið Nótaskip hevur mælt til, at Føroyar ikki í løtuni fara at áseta sær eginkvotu av makreli, men heldur royna at finna semju við hini strandalondini um eitt betri býti.

Felagið Nótaskip hevur soleiðis mælt til, at Føroyar halda fram við samráðingunum um makrelin hetta árið aftrat.

Andri Hansen er eisini ivasamur, um tað er rætt av landsstýrismanninum at áseta Føroyum eina eginkvotu upp á 150.000 tons í ár.

- Eg hevði hildið tað verið skilabetri, um Føroyar kanska heldur ásettu sær eina royndarkvotu í ár fyri at fáa staðfest, um so nógvur makrelur er í føroyskum sjógvi í summarhálvuni, sum menn veruliga vilja vera við, sigur hann.

Skiparin á Finni Fríða ivast soleiðis í, um tað er rætt – í óðum verkum – at taka so rívan til, sum landsstýrismaðurin hevur í hyggju at gera.

### Ymisk sjónarmið

Tað er annars rættiliga ymiskt, sum sagt verður av fiskifeltinum um íblanding av makreli.

Herfyri frættist, at føroysk svartkjaftaskip, sum royna sunnarlaga í føroyskum sjógvi, kundu ikki fiska um náttina, tí so nógvur makrelur var uppi í veiðini.

Fiskiveiðieftirlitið, sum var á svartkjaftaleiðunum við Tjaldrinum og kannaði veiði og reiðskap hjá fleiri skipum, segði herfyri í Sosialinum, at íblandingin kundi liggja um eini 50 tons av makreli í hvørjum 900 tonsum av svartkjafti.

Komandi tíðin fer at vísa, hvussu verður og ikki, nú summarið stundar til, og besta makreltíðin í føroyskum sjógvi nærkast.

vilmund@sosialurin.fo



*Andri Hansen, skipari á Finni Fríða, mælir til, at Føroyar áseta sær eina royndarkvotu eftir makreli – og ikki eina stóra eginkvotu*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Gulllaksi dámar ikki høgættina

**GULLLAKSUR Í dag og í gjár hava trý gulllaksaskip landað í Saltangará, men hendan túrin hevur veiðan verið heldur slakari enn annars. Hildið verður, at tað er høgættin, sum er orsøkin**

Vilmund Jacobsen

Í morgun hava Polarhav og Stjørnan landað góð 400.000 pund av gulllaksi í Saltangará.

Eysturbúgvin, sum eisini er á gulllaksaveiði, landaði umleið 200.000 pund í Saltangará í gjár. Eysturbúgvin partrolar saman við Vesturbúgvanum, sum landaði í Kollafirði.

Seinastu dagarnar hevur gulllaksaveiðan ikki roynst líka so væl, sum undanfarnu túrar hjá hesum skipum. Høgættin plagar nevniliga ikki at roynast best til gulllaks.

Skipini, sum landaðu gulllaks í Saltangará í dag og í gjár, hava roynt í einar 4-5 dagar.

### Upsaskip

Á landingarmiðstøðini Kongshavn vænta tey eisini okkurt par við upsa seinni í hesi vikuni, og væntandi verða Stelkur og Bakur teir fyrstu, sum koma inn at landa.

- Skipini skuldu helst komið mikudagin, men upsaveiðan er framvegis vánalig, og tí vænta vit ikki teir fyrstu bátarnar fyrr enn fríggjadagin, siga tey á landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará.

vilmund@sosialurin.fo

